

# EIN HEILSUFRØÐILIGA GÓÐKENDUR HJALLUR
## *- hvat skal til?*

*Ein stutt lýsing av kjakinum um hjallin - og ein frágreiðing, í mynd, teksti og tekningum, sum ítøkiliga vísir, hvat ið skal gerast fyri at fáa ein hjall góðkendan at turka kjøt í, eftir nýggju matvørulógini.*

ÚTOYGGJAFELAGIÐ

www.utoyggj.fo

## Innihald

1. Inngangur ... s. 3

2. Hjallurin og nýggja matvørulógin ... s. 4

3. Kjakið um hjallin og útgangsstøði fyri hesi verkætlan ... s. 5

4. Teir útvaldu hjallarnir - hvat krevst? ... s. 6

6. Tekningar og útgreining ... s. 6

Hjallurin á Trøllanesi ... s. 7

Hjallurin í Mykinesi ... s. 10

Hjallurin á Syðradali ... s. 14

7. Tilfar og kostnaður ... s. 18

8. Samanumtøka ... s. 19

9. Skjøl ... s. 20

**Útoyggjafelagið**
Geilargøta 6
513 Syðrugøta

Tlf. 292592
utoyggj@gmail.com
www.utoyggj.fo

*Verkætlanin er fíggja við stuðli frá Almannaráðnum, av játtanini til menning á útoyggj.*

# 1. Inngangur

Henda frágreiðing snýr seg um, hvussu ein vanligur, siðbundin hjallur kann lagast til, so at hann kann verða góðkendur av heilsufrøðiligu myndugleikunum og lúka treytirnar í nýggju matvørulógini.

Endamálið er at fáa greiðu á, hvat nýggja matvørulógin krevur, hvat tað kostar at fremja krøvini, og hvussu krøvini á annan hátt ávirka ella gera inntriv í útsjónd, góðsku og hvussu hjallurin verður nýttur.

Við hesi kunning verða krøvini til góðkendar umstøður gjørdar ítøkiligar. Hetta fer vónandi at gera kjakið um hjallin fjølbroyttari, samstundis sum tilfarið eisini kann brúkast sum frymil í tilgongdini til at fáa ein vanligan hjall góðkendan at turka kjøt í, um ætlanin er at selja til handlar og matstovur. Men samstundis skal sigast, at atgongdin til góðkent flettingarhøli og hjallurin eru óloysiliga knýtt hvørt at øðrum, hóast henda frágreiðing bara lýsir hjallin.
At Útoyggjafelagið átók sær uppgávuna at greina málið um lógarkrøvini til ein góðkendan hjall, grundar ítøkiliga á kjakið í einum arbeiðsbólki undir Vinnumálaráðnum, har felagið tók lut.

Frágreiðingin er skipað soleiðis, at hon í fyrsta umfari lýsir broytingina í nýggju lógini um matvørur, og tað kjakið, sum stóðst kring hjallin. Síðani eru tekningar og frágreiðingar, ið vísa, hvat ítøkiliga skal gerast fyri at søkja um løggilding. Tilfarslisti, mettir prísir, mannagongdir o.a. er eisini tøkt. Heilsufrøðiliga Starvsstovan (HSF) hevur givið tilfarinum sítt viðmæli, og tí er tað eftirfarandi, hóast hvør einstakur, ið skal undir at fáa løggilding, noyðist at samskifta við HSF.

Á RÆST 2015-tiltakinum verður eitt modell av forrúminum til ein hjall víst fram. Forrúmið er sniðgivið soleiðis, at tað kann brúkast til flestallar vanligar føroyskar hjallar. Tekningin til forrúmið er tøk til teirra, sum hava brúk fyri henni.

Vit takka Almannaráðnum fyri stuðulin til verkætlanina, umframt INOVA, Janusi Vang, og Vinnumálaráðnum fyri at taka hetta við á RÆST 2015. Tøkk til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Elspu Olsen, fyri gott samstarv, Kontrast fyri gott og konstuktivt arbeiði. Tøkk til Kenn Zachariassen fyri at smíða modellið og Balslev fyri at lata tilfarið. Eisini ein stór tøkk til tykkum á útoyggjum, ið hava latið tilfar, myndir og kunning um tykkara hjallar, at brúka sum grundarlag.



## 2. Hjallurin og nýggja matvørulógin

Lógin um matvørur, sum er galdandi í dag, kom í gildi 22. mai 2015, og er ein dagføring av lógini frá 26. mai 2010, ið avloysti lógina um matvørur frá 1985.

Tað, sum viðkemur hesi frágreiðing, er: m.a. 8. kapittul, um virkir. Talan er mest um grein § 26. Stk. 2. har tað stendur, at Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um tær treytir, sum matvøruvirki skal lúka fyri at verða løggilt ella skrásett. Síðani § 32. um framleiðslu til egin nýtslu. og kap. 17. Gildiskoma v.m.- Stk. 2. Har stendur m.a.: “Framleiðsla, viðgerð, marknaðarføring og søla av føroyskum seyða- og neytakjøti til endabrúkaran umvegis heil- ella smásølu verður tó framvegis regulerað eftir galdandi siðvenju smbrt. løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985 um matvørur v.m. til 1. januar 2017”. Her síggja vit, at gildiskoman, av tí, sum snýr seg um seyða- og neytakjøt, ikki verður fyrr enn 1. januar í 2017.

Orsøkin til at hetta er útsett enn eina ferð, er kjakið, sum kom í kjalarvørrinum av broytingunum. Tey, sum løggávan ávirkar, hava víst á, at lógin er eitt so stórt inntriv í vanliga mátan at skipa fletting, ræsing og turking, at hon fer at forkoma okkara elligomlu siðvenju á økinum.

Við støði í lógini um matvørur frá 2010 gørdi Heilsufrøðiliga Starvsstovan í 2011 eina vegleiðing til, hvussu ein hjallur skal innrættast fyri at fáa løggilding. (sí fylgiskjal). Í vegleiðingini stendur m.a., at hjallurin skal hava forrúm við hondvaski og starvsfólkini hava atgongd til vesi. Hjallurin skal eisini hava turkirúm, pakkirúm og goymslu til pakkitilfar. Tað vóru serliga hesi krøvini, ið skapti kjakið og øsingina, tí sum vera man sá hetta út til at vera ein heilt annar hjallur, enn tann vanligi føroyski, og íløgurnar so stórar, at tað als ikki kundi loysa seg. Ein annar partur av kjakinum snúði seg um góðskuna á kjøtinum. Tey flestu kenna sín hjall, og hann er lagaður til umstøður og umhvørvi á staðnum, tí varð tað mett sannlíkt, at ov nógvar broytingar komu at oyðileggja smakkin á kjøtinum.



## 3. Kjakið um hjallin og útgangsstøði fyri hesi verkætlan

Sum ein avleiðing av kjakinum og ónøgdini í vinnuni um nýggju matvørulógina, setti Vinnumálaráðið í 2013 ein arbeiðsbólk at viðgera møguligu óhepnu avleiðingarnar av lógini. Hetta komst serliga av, at undantøkini í lógini vóru ásett at fara úr gildi í juni 2015 (seinni útsett til 1. jan. 2017). Arbeiðsbólkurin var skipaður við áhugapørtum í vinnuni, umboðað av: Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Bóndafelagnum, Útoyggjafelagnum, kokkayrkinum, sláturvirkjum og Vinnumálaráðnum.

Eftir fleiri fundir í arbeiðsbólkinum, og uttan at nøkur veruliga semja kundi finnast millum partarnar um, hvussu lógin kom at ávirka vinnuna, kom ein niðurstøða frá bólkinum, ið var soleiðis orðað:
*"Tað tykist, sum at fatanin av, hvat krevst fyri at løggilda framleiðsluna, er ógvuliga ymisk. Umboðini fyri smáu framleiðararnar halda, at krøvini tykjast ógvuliga trupul og kostnaðarmikil. Tey stúra eisini fyri, at krøvini til innrætting og til strangar mannagongdir kunnu skaða siðbundnu framleiðsluna, har tey ungu læra frá teimum eldru, hvussu best verður atborið."*

Heilsufrøðiliga Starvsstovan vísir hinvegin á, at fleiri umsóknir eru ávegis um løggilding, og at tað tí als ikki er vist, at óttin er grundaður. Tey gera eisini vart við, at tað er so ymiskt, hvussu krøvini til løggilding kunnu lúkast, alt eftir hvussu umstøðurnar eru á staðnum, og at tað tí ikki altíð nýtist at vera so trupult.

Betri kunning um krøvini til løggilding, og fordømi um, hvussu tað kann gerast, kunnu helst minka um misskiljingarnar og óttan fyri tí ókenda. Men spurningurin er, hvør skal geva hesa kunning".

Víðari varð sagt undir yvirskriftini: Betri kunning og samskifti kann stuðla upp undir matvørumenningina. "Um ynski er um at gera betri kunning, fyri soleiðis at stuðla upp undir størri smáframleiðslu, so kann tað gerast av nógvum ymiskum. a. Framleiðararnir kunnu sjálvir taka seg saman, og lýsa fordømi og framleiða leiðbeiningar. Útoyggjafelagið ella bóndafelagið kundu t.d. átikið sær uppgávuna.(kelda:síða 2 niðurstøða frá arbeiðsbólkinum um matvørutrygd og matvørumemming VMR 2014.)

**Sum sagt so gjørt**
Útoyggjafelagið átók sær uppgávuna at veita kunning til krøvini til hjallin. Og felagið søkti um fígging til verkætlanina frá Almannaráðnum, av játtanini til menning á útoyggj. Felagið hevur, síðani tað var stovnað, havt sum endamál at arbeiða fyri betri umstøðum at reka vinnu á útoyggj. Longu í Útoyggjaálitinum var eitt av tilmælunum at virka fyri góðkendum umstøðum at fletta og framleiða burtur úr lokala tilfeinginum, fyri at fáa meira burtur úr og fyri at stimbra nýhugsan. Framleiðsluhúsið í Dímun er m.a. eitt dømi um eitt slíkt tiltak. Hesa verkætlan við hjallinum mettu vit at eisini hóska væl til hetta endamálið, og tí fóru vit undir hana.



# Teir útvaldu hjallarnir - hvat krevst?



Á Trøllanesi
Jógvan Joensen



Í Mykinesi
Esbern í Eyðansstovu



Á Syðradali
Erik Eliasen

# Hjallurin á Trøllanesi








KONTRAST
Byggilist & byggifrøði


681
924
781
2386
Útveggur:
Fibertrespopláta
Gipsopláta
Stólpar
9 mm vindpláta
Lektir 38x56 mm
22 mm timburklæðing
Rist
Knagar
2000
600
Skitin
Klæðir
Skitið gólv
Skáp v/skjótihurð til rein klæðir
Rein
Klæðir
Reint gólv
Vask
1386
1586


Sinustekja
Bjálki
Síðuveggir uppum tekju
Rimar
Flugunet
Lektir
Stórviður
Alt timbur verður mála ella viðgjørt við ávíkavist máling ella serligari olju
Knagar
Rein Klæðir
Skitin Klæðir
Pakkiborð
Skjótihurð
Forrúm
Hjallur
Frárensl
Gólv verða yvirflatuviðgjørd
Trin 3 - Hjallur
Trin 2 - Rein klæðir
Trin 1 - Skitin klæðir
3452
3350
3200
2150
2300
2205
2250
2420
150
150




**Hjallur á Trøllanesi**

- Allir grótveggir verða klæddir við fibertrespoplátum, sum eru léttar at reingerða.
- Frárenning av yvirflatuvatni skal verða úr hjallinum, og skal tryggjast við rist ella vatnlási, soleiðis at mýs og rottur ikki sleppa upp gjøgnum røri.
- Pakkiborð verður hongt uppá veggin, soleiðis at tað ikki tekur óneyðugt pláss í hjallinum. Pakkiborðið kann smíðast soleiðis, at tað kann klappa upp ella niður annað uppá hjallin.
- Flugunet verður fest ímillum stórviðin við lektum.
- Gólv skulu verða sløtt, løtt at halda rein, skal verða av tilfari sum ikki tekur vatn í seg - betong, sum verður forseglað við betongmáling (epoxy), verður nevnt sum léttast loysn.
- Alt timbur, so sum veggir, bjálkar, rimar o.l. skal antin málast við serligari máling ella viðgerðast við serligari olju, soleiðis at tað er lætt at gera reint.
- Stálásar/skinnarar festast á tvørliggjandi bjálkar. Krov verða hongd á stálspritar á hesar stálásar, hetta so at krovini ikki koma í samband við timbur og viðgerina av hesum.

**Forrúmi/Dururin**

- Leiðbeining skal hangast í forrúmi, soleiðis at brúkarin altíð veit, hvussu farast skal fram
- Forrúmið hevur tvey trin. Tað fyrsta er har sum brúkarin letur seg úr skitnu klæðunum og vaskar sær hendurnar. Tað næsta trinið er har sum brúkarin letur seg í rein klæðir og reinar skógvar. Skáp er til rein og skjótihurð kann skjótast fyri skitnu klæðini sum hanga á knagum á vegginum við síðuna av, soleiðis at hesi ikki koma í samband við hvørt annað.
- Veggirnir eru klæddir við fibertrespoplátum, sum eru léttar at reingerða.
- Flugudrepari er í forrúmi.
- Posar til krov skulu goymast í forrúmi í skápi til rein klæðir.



KONTRAST
Byggilist & byggifrøði

# Hjallurin í Mykinesi






KONTRAST
Byggilist & byggifrøði








KONTRAST
Byggilist & byggifrøði


Rimar
Flugunet
Lektir
Stórviður
Alt timbur verður mála ella viðgjørt við ávíkavist máling ella serligari olju
Pakkiborð
Hjallur
Frárensl
Gólv verða yvirflatuviðgjørd


Sinustekja
Bjálki
Síðuveggir uppum tekju
Knagar
Rein Klæðir
Skitin Klæðir
Trin 3 - Hjallur
Skjótihurð
2000
Trin 2 - Rein klæðir
Forrúm
Trin 1 - Skitin klæðir



**Hjallur í Mykinesi**

- Allir grótveggir verða klæddir við fibertrespoplátum, sum eru lættar at reingerða.
- Frárenning av yvirflatuvatni skal verða úr hjallinum, og skal tryggjast við rist ella vatnlási, soleiðis at mýs og rottur ikki sleppa upp gjøgnum røri.
- Pakkiborð verður hongt uppá veggin, soleiðis at tað ikki tekur óneyðugt pláss í hjallinum. Pakkiborðið kann smíðast soleiðis, at tað kann klappa upp ella niður annað uppá hjallin.
- Flugunet verður fest ímillum stórviðin við lektum.
- Gólv skulu verða sløtt, løtt at halda rein, skal verða av tilfari sum ikki tekur vatn í seg - betong, sum verður forseglað við betongmáling (epoxy), verður nevnt sum lættast loysn.
- Alt timbur, so sum veggir, bjálkar, rimar o.l. skal antin málast við serligari máling ella viðgerðast við serligari olju, soleiðis at tað er lætt at gera reint.
- Stálásar/skinnarar festast á tvørliggjandi bjálkar. Krov verða hongd á stálspritar á hesar stálásar, hetta so at krovini ikki koma í samband við timbur og viðgerina av hesum.

**Forrúmi/Dururin**

- Leiðbeining skal hangast í forrúmi, soleiðis at brúkarin altíð veit, hvussu farast skal fram.
- Forrúmið hevur tvey trin. Tað fyrsta er har sum brúkarin letur seg úr skitnu klæðunum og vaskar sær hendurnar. Tað næsta trinið er har sum brúkarin letur seg í rein klæðir og reinar skógvar. Skáp er til rein og skjótihurð kann skjótast fyri skitnu klæðini sum hanga á knagum á vegginum við síðuna av, soleiðis at hesi ikki koma í samband við hvørt annað.
- Veggirnir eru klæddir við fibertrespoplátum, sum eru lættar at reingerða.
- Flugudrepari er í forrúmi.
- Posar til krov skulu goymast í forrúmi í skápi til rein klæðir.

KONTRAST
Byggilist & byggifrøði

# Hjallurin á Syðradali






KONTRAST
Byggilist & byggifrøði








KONTRAST
Byggilist & byggifrøði







KONTRAST
Byggilist & byggifrøði



**Hjallurin í Syðradali**

- Allir grótveggir verða klæddir við fibertrespoplátum, sum eru lættar at reingerða.
- Frárenning av yvirflatuvatni skal verða úr hjallinum, og skal tryggjast við rist ella vatnlási, soleiðis at mýs og rottur ikki sleppa upp gjøgnum røri.
- Pakkiborð verður hongt uppá veggin, soleiðis at tað ikki tekur óneyðugt pláss í hjallinum. Pakkiborðið kann smíðast soleiðis, at tað kann klappa upp ella niður annað uppá hjallin.
- Flugunet verður fest ímillum stórviðin við lektum.
- Gólv skulu verða sløtt, løtt at halda rein, skal verða av tilfari sum ikki tekur vatn í seg - betong, sum verður forseglað við betongmáling (epoxy), verður nevnt sum lættast loysn.
- Alt timbur, so sum veggir, bjálkar, rimar o.l. skal antin málast við serligari máling ella viðgerðast við serligari olju, soleiðis at tað er lætt at gera reint.
- Stálásar/skinnarar festast á tvørliggjandi bjálkar. Krov verða hongd á stálspritar á hesar stálásar, hetta so at krovini ikki koma í samband við timbur og viðgerina av hesum.

**Forrúmi/Dururin**

- Leiðbeining skal hangast í forrúmi, soleiðis at brúkarin altíð veit, hvussu farast skal fram.
- Forrúmið hevur tvey trin. Tað fyrsta er har sum brúkarin letur seg úr skitnu klæðunum og vaskar sær hendurnar. Tað næsta trinið er har sum brúkarin letur seg í rein klæðir og reinar skógvar. Skáp er til rein og skjótihurð kann skjótast fyri skitnu klæðini sum hanga á knagum á vegginum við síðuna av, soleiðis at hesi ikki koma í samband við hvørt annað.
- Veggirnir eru klæddir við fibertrespoplátum, sum eru lættar at reingerða.
- Flugudrepari er í forrúmi.
- Posar til krov skulu goymast í forrúmi í skápi til rein klæðir.

# Tilfar og kostnaður

| **Tilfar til verandi hjall:** | **Kostnaður:** |
|---|---|
| 1 m² av flugunetíð | 35 kr. |
| 1 stk pakkiborð | 2.500 kr. |
| 1 m² trespopláta (til klæðing av grótveggum) | 250 kr. |
| Pr metur - stál'bjálkar' at hanga spritir á | 170 kr. |
| 1 stk sprita til krov | 150 kr. |
| Yvirflatuviðgerð av betong pr. m² | 100 kr. |
| Yvirflatuviðgerð av øllum timbri pr. m² | 80 kr. |
| Frárensl | 1.500 kr. |
| | |
| **Arbeiðsløn í 5 dagar** | **12.000 kr.** |
| | |
| **Tilfar til forrúm til hjall** | **31.400 kr.** |
| herundir: | |
| | |
| Innbygt skáp | |
| Tekja+takrenna | |
| Gólv m²/fundament | |
| Útveggir m² | |
| Vask+borð | |
| Úthurð | |
| Innhurð | |
| | |
| **Arbeiðsløn í 5 dagar** | **12.000 kr.** |

| **Dømi um samanrokning av hjalli og forrúmi, Hjallurin á Trøllanesi** | **Kostnaður:** |
|---|---|
| 23 m² av flugunetið á 35 kr m² | 805 kr. |
| 1 stk pakkiborð | 2.500 kr. |
| 27,5 m² av Trespoplátum á 250 kr m² | 6.875 kr. |
| 12 leypandi metrar av stál'bjálkum' | 2.040 kr. |
| 25 stk spritar til 25 krov | 3.750 kr. |
| 30 m² betonggólv yvirflatuviðgjørt | 3.000 kr. |
| 25 m² timbur yvirflatuviðgjørt | 2.000 kr. |
| Frárensl við rør | 1.500 kr. |
| | |
| Arbeiðsløn í 5 dagar | 12.000 kr. |
| | |
| Tilfar til forrúm til hjall | 31.400 kr. |
| | |
| Arbeiðsløn í 5 dagar | 12.000 kr. |
| | |
| **Hjallur og forrúm, tilsamans (v/mvg)** | **77.870 kr** |

**Allir prísir eru íroknað mvg**

KONTRAST
Byggilist & byggifrøði

# Samanumtøka

Ásetingarnar um góðkenning av hølum til fletting og turking, eru útsettar til januar 2017 – eftir hetta, er ógreitt hvussu krøvini verða.

Tað er gjørligt at broyta verandi, siðbundna hjallin, uttan at gera stór inntriv í útsjónd og virknað.

Tað kostar uml.77.870,- íroknað MVG, at gera ein hjall kláran til løggilding

Tað er sannlíkt, at ein íløga í løggildar umstøður, at fletta og turka kjøt, kunnu føra við sær betri prísir og breiðari vøruúrvalið.

Tørvur er á fíggingarmøguleikunum, skulu fleiri kasta seg út í, at skipa sær løggildar umstøður at virka undir.





# MANNAGONGD

(Uppskot)

## Vegleiðing til reinførið o.a. í hjallinum

Meðan kjøtið hongur í hjallinum, skal ongin onnur vøra vera inni. Áðrenn turkingin byrjar, skal hjallurin vaskast og sóttreinsast og vera turrur. Farast skal ikki undir turking ella ræsing, um ov lýtt er í veðrinum.

Viðmælt verður, at brúka sápu, ið er egna til at vaska rúm við matvøruframleiðslu.

-----------------------------------------

- ✓ Tá tú kemur inn í forrúmið, far í reinan fót- og arbeiðsbúnað.
- ✓ Vaska hendurnar í heitum ella flógvum vatni, flótandi sápu, og turka í pappírshandklæði.
- ✓ Um tú skal brúka knív ella annað amboð, tryggja tær, at tað er reint.
- ✓ Tá kjøtið verður borðið inn og út úr hjallinum, skulu tað altíð vera tvey um tað. Ein sum handar kjøtið inn í forrúmið, og ein sum er í reinum búnað, ið tekur í móti og hongur tað upp.
- ✓ Tá kjøtið skal út úr hjallinum, skal tað fáa ein posa uttaná, og handast til ein, sum tekur í móti og fær tað í flutningsfarið.
- ✓ Posar til kjøtið, skulu liggja ovast, inni í skápinum har tey reinu klæðini liggja.
- ✓ Tryggja, at flugunetið er í góðum standi og reint.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv, høvuðsmálið er, at umhvørvi er reint og bert verður handfarið, við reinum hondum og í reinum búnað.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN



# Vegleiðing

## Innrætting av hjalli at turka kjøt í

**Endamál:**
Turking av seyðakjøti, skera sundur, pakka til sølu til endabrúkara.

**Alment:**
Farast skal ikki undir turking ella ræsing av kjøti, um ov lýtt er í veðrinum.

**Staðseting:**
Hjallurin skal standa á slíkum stað, at dálking frá øðrum virksemi ella frá lendinum rundanum ikki verður borin at kjøtinum. Eisini má hann standa soleiðis fyri, at góður gjóstur fæst.

**Hølir:**

- Forrúm við hondvaski
- Turkirúm
- Pakkirúm
- Goymsla til pakkitilfar

**Innrætting:**
Innrætting av hjalli skal tryggja, at temperaturin í kjøtinum so vítt gjørligt fellur javnt niður um 7º C. Hitin í hjallinum skal skrásetast dagliga.

- Turkirúm skal vera við rimum á minst 2 síðum, so at luftskiftið er støðugt og ótarnað.
- Rúmið má vera so stórt, at krovini ikki nerta við hvørt annað, og ikki koma at útveggi.
- Hjallurin skal vera vardur ímóti skaðadjórum: vera rottu- og músatættur, hava flugunet fyri rimar
- flugulampu í forrúmi, og skipan fyri týning av rottu og mús.
- Forrúm skal vera, soleiðis at atgongd ikki er til turkirúm beinleiðis uttanífrá.
- Forrúm skal um neyðugt hava hóskandi pláss og útgerð at skera sundur og pakka við.
-

**Útbúnaður:**

- Handvask skal vera í forrúmi, við flógvum vatni og ikki handstýrdum krana. Flótandi sápa, pappírshandklæði og ruskílat skulu vera við hondvaskið.

**Tilfar:**

- Veggir, loft, gólv og útgerð til at hongja kjøt á skulu vera úr hørðum,sløttum tilfari, ið ikki drekkur vatn í seg, ikki gevur skaðilig evni frá sær, og sum er lætt at halda reint.
- Frárensl skal vera í gólvi í turkirúmi. Um gólvið er rimagólv, skal undirlendið vera asfalterað ella stoypt.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast.
- flugulampu í forrúmi, og skipan fyri týning av rottu og mús.
- Forrúm skal vera, soleiðis at atgongd ikki er til turkirúm beinleiðis uttanífrá.
- Forrúm skal um neyðugt hava hóskandi pláss og útgerð at skera sundur og pakka við.

**Reingerð:**
Áðrenn turkingin byrjar, skal hjallurin vaskast og sóttreinsast og vera turrur.

**Persónligt reinføri:**

- Arbeiðsfólk skulu hava hóskandi arbeiðsbúna, sum skal vera reinur.
- Atgongd skal vera til starvsfólkavesi, ið ikki er partur av privata húsarhaldinum í tíðarskeiðinum, hjallurin er í brúki.

**Annað:**
Meðan kjøt hongur í hjallinum, skal ongin onnur vøra vera inni.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.